átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Jesus segði: "Ríki mítt er ikki av hesum heimi"

(Jóhannesar evangeliið 18,36)

*Eftir John S. Myllhamar, Sandavágur*

Guðs ríki er ein veruleiki mitt í hesum heimi. Ódnirnar í tí hava verið harðar, og gjøldur hevur verið gjørdur burtur úr tí. Tað skuldi nokk kunnað leggjast í oyði!

Tað hevur ikki verið spart við álopsvápnum. Kongurin í hesum ríki varð píndur á einum krossi. Børnini í hesum ríki vórðu tveitt til síðis ella beind av vegnum. Lógirnar í hesum ríki vóru blástar langan veg, og skattirnir í hesum ríki høvdu ongan áhuga. Men tað løgna er hent: Ríkið varð standandi!

Heimsins ríki vórðu koyrd um koll. Stats- og samfelagsskipanir broyttust, og kongaríki skulvu í grundini. Ofta var teskað í ormagarði, at nú vóru eisini dagarnir hjá Guðs ríki taldir. Men áðrenn ein visti av, blómaði hetta ríkið sum ein rósugarður á nýggjum støðum. TÍ RÍKI HANSARA ER IKKI AV HESUM HEIMI.

- Heilt nýggjar kreftir standa tilreiðar í hesum ríki; kreftir, ið gera alt menniskjaligt skil til skammar og sum hótta allar spillandi kreftir.

Ríkið mítt er ikki av hesum heimi. Guðs vald er ævigt. Ongantíð fer tað til grundar, tað kann ikki "Ríki hansara kann aldri farast", skrivar Dánjal profetur. Einki ættarlið man treingja meira til at hoyra hetta, enn okkara.

Vit trúgva tí ikki, at menniskja kann endurreisa paradísið á jørð. Vit vita, at øll ríki heimsins skulu fara til grundar. Og so venda vit eygum okkara móti Honum, sum stendur andlit til andlits við umboðsmannin hjá jarðarinnar valdi, Pontius Pilatus. Til hansara leita vit, og so biðja vit: Komið ríki títt!

Bara í ríki hansara er trygt at búgva.

# Gleði meg at fara á ungdómsmøti



*- Tað er gott at kunna lesa Bíbliuna heima við hús, men ein hevur eisini brúk fyri einum andaligum felagsskapi, sigur Karstin Høgnesen í Leirvík (fremst á myndini)*

**Hvørt sunnukvøld bjóða tey ungu inn til ungdómsmøti í missiónshúsinum í Leirvík. Her verða ymisk evni tikin fram um, hvussu ein kann liva lívið sum ein trúgvandi ungdómur**

**Leirvík**: - Endamálið er at vísa teimum ungu, at Jesus er livandi í dag, eins og hann var tað fyri 2000 árum síðani, sigur leirvíkingurin Kartin Høgnesen.

Hann er ein av limunum í ungdómsnevndini í missiónshúsinum, og leiðir eisini fleiri av møtunum.

Hóast Kartin hevur verið trúgvandi eina tíð og situr í nevndini, hevur hann tørv á at koma til hesi ungdómsmøtini.

- Eg fái sjálvur nógv burturúr. Eg verði uppbygdur andaliga, og fái styrki til at liva eitt lív sum trúgvandi gjøgnum vikuna. Eg gleði meg altíð til sunnukvøld kl. 9, sigur hann.

Í ungdómsnevndini sita Suni Justinussen, formaður, Kartin Høgnesen, Petur Súni Jacobsen, John Nolsøe Olsen, Helena Kannuberg og Andrias Djurhuus.

Ungdómsmøtini eru sunnukvøld kl. 21 og vara í hálvanannan tíma ella so. Aftaná er ein góður drekkamunnur at fáa í kjallarinum.

**Ymisk evni**

Hóast evnini, sum verða umrødd kunnu verða ymisk, hava ungdómsmøtini í Leirvík kortini sama innihald sum onnur ungdómsmøti kring landið.

Ein stórur partur av skránni er sangur og tónleikur. Her verður sungið bæði á enskum og føroyskum máli, áðrenn talarin til kvøldið sleppur framat við sínum evni, sum annaðhvørt er umbiðið ella talarin sjálvur velur eitt evni.

- Vit leggja dent á at taka upp evni, sum eru frammi í tíðini. Er okkurt andaligt evni frammi, og sum nógv ung tosa um, so kunnu vit gott hava eitt ungdómsmøti um júst tað evnið, sigur Kartin.

Í vetur hava tey m.a. lært um Martin Luther, hvønn týdning Jesus-navnið hevur og um at hava álit á Bíbliuni, sum er Guds sanna orð.

- Vit ynskja eisini at vísa teimum ungu á Jesus, soleiðis at hann kann gerast teirra frelsari, slær Kartin Høgnesen fast.

Vanliga eru tey omanfyri 50 á ungdómsmøti. Onkutíð upp ímóti 70 og onkutíð niðanfyri. Tey koma bæði úr Leirvík, Fuglafirði, Toftum, Rituvík og Gøtu.

# Kina sum eitt bíbliu-veldi

**Gongst sum ætlað fer Kina at framleiða ein fjórðing av øllum heimsins bíblium í 2009. Mánadagin í komandi viku verður ein risastór prentsmiðja vígd**

Nýggja prentsmiðjan fer at kunna prenta 23 bíbliur um minuttin í útgávum, sum serliga venda sær til tey 10 ymisku málini í landinum.

Aftanfyri ta 48.000 fermetrar stóru prentsmiðjuna stendur felagsskapurin Amity Foundation, sum samstarvar við bretska bíbliufelagið.

Í fjør hátíðarhelt felagsskapurin at Bíblia nr. 50 millión varð prentað í Kina.

- Tað er einki minni enn eitt undur, at Gud skapar møguleikar fyri at prenta í milliónatali av bíblium til tey kristnu í Kina, sigur leiðarin í felagsskapinum, Zhang Liwei sambært bretska blaðnum The Guardian.

Eingi hagtøl eru yvir, hvussu mong kristin eru í Kina. Onkur sigur 40 mió kristin, men semja er kortini um, at talið av kristnum kinesarum er í stórum vøkstri.

Og nú fáa tey so eisini møguleika at lesa Bíbliuna á sínum egna máli.

## Kvinnur hittast til stevnu

**Nesvík**: Hetta vikuskiftið hava kvinnur í hópatali leitað sær til leguhúsið í Nesvík. Hetta hendir í samband við landsstevnuna hjá Sjómanskvinnuringunum kring landið, og sum byrjar í kvøld og endar seinnapartin sunnudagin.
Á skránni er orðaskiftið um arbeiðið, bíbliutími, møtir og gudstænasta. Við á landsstevnuni verður Finn Juhl Nielsen, ið starvast innan sjómansmissiónina í Danmark.

## Eyðgunn og Bill tjakast um rúsevni

**Toftir**: Komandi vikuskifti hevur Bláikrossur landsfund sín í missiónshúsinum og kirkjuni í bygdini. Fundurin byrjar leygarmorgunin við áhugaverdum tjaki millum løgtingsfólkini Eyðgunn Samuelsen og Bill Justinussen. Tey bæði fara at tjakast um ábyrgdina sum samfelagið hevur at tryggja børnum og ungum ein rúsfrían uppvøkstur. Á landsfundinum fara nøkur blákrossfólk eisini at tosa um felagsskapin í dag og í tíðini framyvir. Við á fundinum verður haraftrat Heidi Westborg Steel, sum er altjóða samskipari hjá Bláa Krossi í Noregi. Bláikrossur Føroya hevur skrivstovu í Runavík. Formaður í landsnevndini er Sverri Steinhólm í Havn.

## Grønur sunnudagur í kirkjuni

**Fólkakirkjan**: Sunnudagurin komandi - Trinitatis sunnudagur – verður í ár hildin sum ein grønur dagur í kirkjum og kristnum samkomum. - At tann grøna hugsanin kemur inn um kirkjugátt og í gudshús, er ikki eitt nýtt fyribrigdi, verður sagt av bispakontórinum. Hugskotið at hava ein slíkan grønan sunnudag eigur Finnbogi Joensen úr Vestmanna. Finnbogi er væl kendur millum fólk, ið geva umhvørvinum gætur. Trinitatis sunnudagur hóskar væl sum grønur sunnudagur. Tað er vár, og summarið er í hondum.
- Eisini gudfrøðiliga er dagurin hóskandi. Vit kunnu altíð meta um, hvørt hetta er tann besti dagurin ella ikki. Havandi í huga tann várliga dámin, veðurlagið og árstíðina, so er valið av degnum heppið, verður sagt.



Sosialurin